# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# AT BANNA SUMMARDEKKUM

Nú nærkast tíðin, tá loyvt er at skøða bilar aftur við píkum. Frá 15. oktober til 1. mai er loyvt at koyra við píkadekkum.

Mikil orðadráttur hevur verið um píkar, líka síðani Dánjal Pauli Danielsen, fyrrverandi landsstýrismaður fyri eini 35 árum síðani bar upp á mál at seta bann móti píkum. Orsøkin var dálking og slit av vegum.

Nógv er granskað í dekkum í sambandi við ferðslutrygd hesi árini, og framburðurin hevur verið sera stórur innan gransking, og nógv dekk eru gjørd, sum liva fult og heilt upp til píkadekkið. Men trupulleikin er bara tann, at á reinum ísi er einki sum píkar.

Fyrr í vikuni kunngjørdi Landsverk eina svenska kanning, sum staðfestir, at samlaða talið av deyðsvanlukkum í vetrarferðsluni er 42% lægri, um bilar uttan ESP - eisini kallað anti spin - eru skøddir við píkadekkum í hálku samanborið við, um bilurin er skøddur við vanligum vetrardekkum. Kanningin vísti eisini, at vandin fyri deyðsvanlukkum á vegunum í hálku fellur 32%, um bilurin hevur ESP - og tá er tað líka mikið um hann er skøddur við vetrardekkum ella píkum.

Slík úrslit eru altíð áhugaverd, tó at hendan kanningin einki sigur um, hvør munur er á vandanum, um tú koyrir við píkum ella vetrardekkum, tá tað ikki er hálka. Í Føroyum hava vit ikki nógvar kavadagar, og tí koyra nógvir bilar við píkum á reinum asfalti, og tá hevur bilurin ikki eins gott vegfesti við píkum sum uttan píkar.

Tað er mikið gott, at vit hava slíkar kanningar, og tað er eisini rætt, at samfelag og løgregla leggja so stóran dent á, at píkarnir fara undan bilunum, tá komið er forbí 1. mai. Vit skulu ikki gera okkum til dómarar yvir, hvat er tryggari, píkar ella vetrardekk. Men koyrir tú við píkum, so spillir tú bæði píkar og asfalt og umhvørvi fyri tað mesta, tí vit hava so fáa dagar við píkaveðri. Men hinvegin skerst ikki burt, at hjá summum og í summum førum er neyðugt at brúka píkar



av eini hvørji orsøk, hon kann vera landafrøðilig ella menniskjanslig.

Men tað tykist løgið, at tann stóri áhugin hjá lóggávuvaldinum ikki eisini er at síggja, nú vit fara forbí 15. oktober. Tá átti tú í veruleikanum ikki at sloppið at koyrt við summardekkum - sum lúka krøvini um 1,6 millimetur. Tá skuldi kravið verið einfalt: Vetrardekk av onkrum nærri defineraðum slag, ella bót. Júst sum við píkunum um summarið.

Varð lóggávan broytt soleiðis, so livdu vit betur upp til nullhugsjónina, sum sigur, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skadd-ur í ferðsluni.

## » Eiga at seta krøv til dekk á bilum um veturin

# Nakað spísk við Sofus


Sosialurin
Mikudagin 6. oktober 2010 · Nr. 142 · 84. árg. · kr. 20,00
RÚSAN UNDIR POSTA
»Sofus vil hava Rúsuna«
Arbeitt verður nú við at rationalisera Rúsuna. Sofus Clementsen, stjóri á Posta, sær stórar fyrimunir í at leggja Rúsuna og Posta saman. Landsstýrismaðurin sigur, at virksemið skal bjóðast út
Eiler Jacobsen deyður
Svari tá fólk ringja 10-11
94 ár og koyrir bil Bilar 23-24
Birgir Páll sleppur leysur
Airport TAXI
AUTO
FAROE

Í Sosialinum mikudagin viðgjørdu vit støðuna hjá Rúsuni og møguleikarnar fyri at samstarva ella leggja saman við Posta fyri at rationalisera.

Men á ávísingini á forsíðuni høvdu vit eina tilgjørda mynd við Rúsuni og Sofusi Clementsen, stjóra á Posta, sum kann geva lesarunum ta fatan, at hann vil leggja Rúsuna undir Posta.

Hetta er ikki rætt, hóast hann sær fleiri eyðsýndar fyrimunir við at samskipa virksemið hjá Rúsuni og Posta.

# Løkke skuldi roynt løgtingið

Danski forsætisráðharrin Lars Løkke Rasmussen er vónbrotin av kjakinum í Fólkatinginum, nú hansara setanartala verður viðgjørd.

Løkke gremur seg um, at kjakið er alt ov nógv merkt av, at fólkatingsval skal verða í seinasta lagi í november næsta ár, og tí er eingin veruligur substansur í kjakinum í løtuni.

– Eg eri ikki naivur, og eg veit, at tað er trupult at hava seriøst kjak í fólkatinginum, tá vit nærkast einum vali, men at tað skuldi verða so trupult, sum tað var í dag, hevði eg ikki væntað, sigur Løkke sambært donskum miðlum.

*Vit siga bara, at Løkke skuldi roynt at arbeitt í løgtinginum, tí har er ikki nógv uttan valstríð at uppliva.*





## » Vit revsa tann besta og studla tí ringasta

KJAK Á SÍÐU 25



## » Vit lótu okkum ikki freista

KJAK Á SÍÐU 31

# Halda eyguni við Facebook

Sosialar netsíður er fyltar við marknaðarføring. Samstundis brúka norðurlendskir brúkarar alt meira og meira tíð á hesum síðum. Teir norðurlendsku brúkaraumboðsmenninir hava avgjørt at kanna hesar sosialu netsíður nærri t.d. Facebook, við tí endamálið at gera eina felags norðurlendska samtykt.

Hetta varð avgjørt, tá ið brúkaraumboðsmenninir úr Finnlandi, Íslandi, Svøríki, Noregi, Danmark og Føroyum vóru savnaðir til norðurlendskan felagsfund í Oslo herfyri.

Umboðsmenninir ynskja í fyrstu atløgu at fáa betri heildaryvirlit, hvørjar marknaðarføringarhættir eru at finna á teimum ymisku sosialu netsíðunum. Síðani verður mett um hesar sosialu netsíður eru í samsvar við galdandi reglur um elektroniska marknaðarføring.

Sosialar netsíður er ein partur av gerandisdegnum, og tí er tað sera áhugavert at marknaðarføra seg á hesum síðum hjá vinnurekandi. Tí hevur tað alstóran týdning, at fáa greiðu á marknaðarføringarreglunum á hesum øki, fyri at fáa best møguliga brúkaraverd á hesum netsíðum.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*